# Dreymastarv

Vit ynskja ein nýggjan starvsfelaga, ið kann standa fyri at gera nýggjar bilar klárar til viðskiftafólk okkara. Arbeiðið fevnir um montering av eykaútgerð og t.d. at pakka út alt tað, ið bilaverksmiðjan hevur pakkað inn. Í so máta er tað sum á jólum, nærum hvønn dag.

Tann, ið settur verður, eigur at hava gott handalag, at vera fyrikomandi og hava eina ósvikaliga fatan av, at í flestu førum kunnu fólk næstan ikki bíða til arbeiðið er liðugt. Tí er viðkomandi ein so sera týðandi liður í fyritøkuni Auto Service. Tú leggur seinastu hond á verkið: Á dreymin, sum er ein nýggjur bilur.

Vit bjóða stak góðar karmar í nýbygdum hølum við nýggjari útgerð og øllum hentleikum. Løn verður latin eftir nærri avtalu.

Hevur tú spurningar til starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Árna Rasmussen, stjóra á tlf. 345400

Umsóknir við viðkomandi skjølum, ið skulu verða okkum í hendi innan 6.apríl, skulu sendast til:

**Auto Service**
**Att.: Árni Rasmussen**
**Við Oyggjarvegin**

TEAM85



PEUGEOT OPEL SAAB NISSAN

Auto Service
www.autoservice.fo

# NORÐOYA APOTEK

## Hevur tú hug at gerast farmakonomur ?

**Vit søkja eftir einum næmingi at byrja 1. mai 2007 ella eftir nærri avtalu.**

**Ert tú áhugað/ur í apoteksarbeiði, kunnu vit bjóða eina spennandi og áhugaverda útbúgving.**

**Farmakonomútbúgvingin umfatar í stuttum at:**

- **Læra um heilsu, heilivág og viðgerð við heilivági, hvørji evni eru í heilivágstilbúningum og hvussu heilivágur virkar og skal handfarast.**
- **Læra at arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir sambart galdandi lógum og reglum.**
- **Læra at geva viðskiftafólki okkara góða tænastu og leiðbeina í samband við útflýggjan av heilivági á apotekinum.**

**Útbúgvingin er ein 3 ára lærutíð, ið fer fram ávíkavist á apotekinum og á Farmakonomskúlanum í Hillerød.**

**Krøv til umsøkjaran:**
**Umframt Students-, HH-, HF-, HT- ella Fiskivinnuskúlaprógv, er tað av týdningi at tú hevur eitt opið sinni og hug at arbeiða við fólki.**

**Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, møguligum viðmælum og arbeiðsroyndum, skal sendast til:**
**Norðoya Apotek**
**Fornagarðar**
**700 Klaksvík**
**áðrenn 16. apríl 2007.**

**Meira fæst at vita um útbúgvingina á**
**www.apotek.fo**
**ella við at ringja á Norðoya Apotek**
**tlf. 45 50 55 og spyrja eftir Kristbjørg.**



# Kundaráðgevar

## til avbjóðandi størv í Tórshavn

Søkt verður eftir 4 kundaráðgevum til privatdeildina í Havn. Starvið er tíðaravmarkað til 6 mánaðir.

Starvið ber í sær stórar avbjóðingar og tætt samstarv millum ráðgevarnar.

Í starvinum sum kundaráðgevi verður dentur lagdur á heildarráðgeving og sølu. Ráðgivið verður um øll viðurskifti av týdningi fyri kundan so sum inngjøld, flutning, frímerkjasøl og pakkar.

Ráðgevin tekur sær eisini av peningaflutningi og er í beinleiðis samskifti við kundan við kassa- og telefontænastu.

Vit ynskja okkum jaligar starvsfelagar, ið duga at samskifta við kundan.

Tú dugir væl at virka sjálvstøðugt og í toymi. Tú má hava góð evni at umstilla teg í broytiligum umhvørvi og kunna ganga undan.

Umsøkjarar skulu hava hóskandi útbúgving, eitt nú handils- ella peningarstovnsútbúgving ella tílíkt.

Størvini verða sett skjótast til ber. Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Føroya Postfelag og Føroya Landsstýri.

Áhugað kunnu seta seg í samband við:

Steinvør Jacobsen
leiðara á tel. 346000
telduposti: steinvor.jacobsen@postur.fo

ella

Hera Kjærbo
starvsfólkaleiðara á tel. 346095
telduposti: heri.kjarbo@postur.fo

Umsókn skal vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 2. apríl 2007 á middegi.

Pf. Postverk Føroya




Send umsóknina til:

Pf Postverk Føroya
Att: Heri Kjærbo
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Postverk Føroya